**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

# Hvøllur samanbrestur millum ráðandi hugsjónir í Føroyum



TÍÐARGREININ
*Magni Laksáfoss*

**Tvær ráðandi politiskar hugsjónir bresta saman í Føroyum í dag: Tann framsókna sosial liberala Sambandshugsjónin berjist móti afturhaldssinnaðu Misskiltu Nationalismuni. Sambandshugsjónin, ið er sosial liberal, setur frælsið og møguleikarnar hjá tí einstaka í miðdepilin. Afturímóti stendur Misskilta Nationalisman. Hjá henni er staturin eitt mál í sjálvum sær. Frælsi og møguleikar hjá tí einstaka hava lítlan og ongan týdning, og einstaklingurin verður fegin offraður í stríðnum hjá Misskiltu Nationalismuni**

Í hesi tíðargrein hyggja vit eftir teimum tveimum ráðandi grundhugsjónum í føroyskum politikki í dag og hvussu tær ávirka fólkið her á landi.

Øðrumegin stendur ein sera konservativ Misskilt Nationalisma, og hinumegin stendur Sambandshugsjónin.

Við at skilja hesar báðar hugsjónir er lættari hjá okkum øllum at síggja og gjøgnumskoða føroyskan politikk í dag, og hvørji árin politikkurin hevur fyri okkum her á landi.

**Misskilta Nationalisman**
Flokkarnir, sum ganga inn fyri Misskiltu Nationalismuni, taka støði í nationalistisku hugsjónini hjá Hegel. Hann trúði, at summi lond vóru útvald av Gudi, og tí høvdu tey rætt til at fara í kríggj við onnur lond og at kasta hatur á aðrar tjóðir. Hegel meinti, at tú kundi síggja hvørjar tjóðir, Guð hevði útvalt, tí tað vóru tær, sum vunnu í krígnum.

Sum dømi um føroyskar flokkar, ið trúgva uppá Misskiltu Nationalismuna, hava vit stórt sæð allar aðrar flokkar enn Sambandsflokkin. Allir hesir flokkar, tó kanska mest Tjóðveldi, royna at mála almenninginum eina fíggindamynd, so ein stríðsstemningur kann pískast upp.

Misskilta Nationalisman brúkar alt sum umbering fyri at seta statin fremst. Í Føroyum verður dag og dagliga trúttað um, at onki ber til uttan fullveldi. Her eru nøkur dømi: Vit kunnu ikki gerast partur av ES uttan fullveldi. Vit kunnu ikki reka ábyrgdarfullan búskaparpolitikk uttan fullveldi. Vit kunnu ikki fara uttanlands við ítróttafólki okkara uttan fullveldi. Og soleiðis frameftir.

Í Misskiltu Nationalismuni ber snøgt sagt onki til uttan fullveldi. Hugsjónin er ein blokkering fyri rationellari hugsan.

Fólkaklokkurin og Tjóðveldi vilja, orsakað av stríðnum fyri fullveldi, heldur við í jarðarferðina hjá EFTA og fylgja seinastu londunum í grøvina, heldur enn at fara inn í frælsa og mennandi felagsskapin ES, sum er tað einasta rationella valið.

Onkuntíð ivast man í, um teir, ið hava Misskiltu Nationalismuna í sínum skjaldramerki, kunnu so mikið sum loysa sær buksurnar uttan fyrst at fáa fullveldi!

**Skerjingin í Ríkisveitingini**
Ríkisveitingin hevur í mong ár verið við til at tryggja føroyingum persónligt frælsi og framburð.

Við høvuðleysa og óumhugsaða niðurskurðinum í Ríkisveitingini valdu flestu polistisku flokkarnir í Føroyum at skerja frælsið hjá einstaklinginum. Útbyggingar av almannaverkinum, heilsuverkinum, skúlaverkinum, granskingini og eldrarøktini gjørdust offur fyri Misskiltu Nationalismuni.

Ja, stutt sagt: Føroyingurin bleiv offraður á heilaga altarinum hjá Misskiltu Nationalismuni.

Misskilta Nationalisman leitar støðugt eftir afturlatnum hurðum og forðingum. Tey royna at niðurbinda møguleikarnar, so forðingarnar kunnu gerast týðiligar. Hetta virkar bæði afturhaldandi og køvandi fyri menningina av landinum. Stokkonservativur hugsunarháttur.

Vónandi fara hesir politikarar skjótt at sleppa Misskiltu Nationalismuni, so fólkið í landinum aftur kann anda frítt í frælsum landi. Tá ber aftur til at fremja framburð og menning í landinum, so møguleikarnir í felagsskapinum verða brúktir, og opnu hurðarnar út í heimssamfelagið kunnu brúkast.

**Sosial Liberalisma**
Í Sambandsflokkinum er ráðandi hugsjónin Sosial Liberalisma.

Lat okkum fyrst hyggja at seinna partinum av navninum av hugsjónini, nevniliga Liberalismuni.

Liberalisma merkir frælsi. Hugsjónin aftanfyri Liberalismuna er frælsi til tann einstaka – til hvørt einstakt menniskja. Tí er sera væl hóskandi, at ein av fyrstu veruligu bardøgunum hjá Liberalismuni var at berjast fyri at sleppa av við trælahaldið.

Frælsisstríðið hjá liberalismuni hevur síðani snúð seg um mong viðurskifti, men altíð hevur hugsjónin verið, at einstaka menniskja skal hava størst møguligt frælsi.

Liberalisman hevur m.a. stríðst fyri frælsinum at seta búgv, har tú hevur hug. Enn í dag eru trupuleikar hjá fólki at hava fullan rætt til at ferðast og búseta seg, har tey vilja – tak bara í Føroyum í dag, har fólk ikki fáa innferðarloyvi til landið, og summi ikki hava loyvi at fáa hjúnarfelagan heim til Føroya. Onnur verða send av aftur landinum.

Eitt annað frælsisstríð hava verið tollmúrarnir. Tollmúrarnir hava sett avmarkingar fyri, at vinnulívið og tann einstaki kann mennast frítt. Hetta stríð er heldur ikki av í dag, sjálvt um flestu lond í Evropu hava sæð ljósið og hava valt at taka seg saman í felagsskapin ES, sum er ein felagsskapur við somu sosial liberalu sjónarmiðum, sum Sambandsflokkurin stendur fyri.

**Privati ognarrætturin**
Størsta stríðið hjá Liberalismuni hevur helst verið stríðið fyri at tryggja ognarrættin hjá tí einstaka. Hin einstaki skal kenna seg tryggan við ognarrættin til húsini hjá sær ella eina fyritøku, ið viðkomandi roynir at byggja upp. Hetta er grundleggjandi fyri, at eitt samfelag kann virka við grundarlagi í privata initiativinum.

Av hesum kann ein og hvør nokk skilja, at Sambandsflokkurin, sum ein liberalur flokkur, gongur inn fyri privata initiativinum og fyri, at privata vinnulívið skal virka frítt. Hetta er tað, vit í dagligari talu nevna kapitalisma.

Hetta skal síggjast í mun til teir flokkar, sum ganga inn fyri almennum ognarrætti til vinnulívið – altso teir sosialistisku flokkarnir. Sum dømi um ein sosialistiskan flokk kunnu vit nevna Javnaðarflokkin – sjálvt um eg ivist í, um hann hevur nokk av hugsjónum eftir í sær til at verða nevndur nakað sum helst.

**Frítt um landamørk**
Tað átti eisini verið lætt at sæð, at Sambandsflokkurin sum ein liberalur flokkur eisini stríðist fyri, at mørk millum lond skulu ikki vera afturlatin. Tvørturímóti skulu fólk kunna ferðast frítt um landamørk í einum frælsum heimi.

Hetta, at lond samstarva tvørtur um landamørk fyri at tryggja einstaklingunum frælsi, er einki meiri enn náttúrligt í einum heimi, har man ynskir framburð og frið heldur enn kríggj og vesaldóm.

Tað, at fólk frítt kunnu ferðast, búseta seg og starvast, har tey ynskja tað í Evropu, er einki annað enn ein sigur fyri liberalismuna. Tann sama sigurin taka vit í dag sum eina sjálvfylgju í Ríkisfelagsskapinum. Men tað er eingin sjálvfylgja! Í føroyskum politikki eru flokkar, sum dagliga arbeiða fyri at strika hesi rættindi hjá einstaklinginum.

Teir fylgja heldur Misskiltu Nationalismuni, har staturin er eitt mál í sær sjálvum og ikki eitt amboð at tryggja einstaklinginum frælsi. Í eygunum hjá hesum flokkum er einstaklingurin bert ein finna, sum kann offrast í talvinum, ið er eitt stríð móti einum uppfundnum fíggjinda! Hesin fíggindi eitur aloftast Danmark.

**Sosiala dimensiónin**
Meðan liberali parturin av sosial liberalismuni er eitt stríð fyri, at rættindini hjá tí einstaka skal hava størri týdning enn staturin, so stavar sosiali parturin av sosial liberalismuni, frá eini hugsjón um, at staturin má tryggja øllum sosialt rættvísi.

Sosialliberal trúgva uppá, at ein demokratiskur og opin statur hevur ein positivan leiklut fyri at tryggja persónligt frælsi.

Hetta kann samanberast við eina kapprenning: Sosialliberalisman ynskir, at øll skulu byrja kapprenningina við somu byrjunarlinju. Tað kann ikki vera rætt, at summi eru fødd til verri sosial kor og tí byrja longur frá málinum enn tey, sum eru fødd til stórar fyrimunir. Øll mugu hava á leið sama møguleika fyri at skapa sær sína egnu lukku og framburð í lívinum – annars hava tey ikki persónligt frælsi.

Tað er tí upplagt, at Sambandsflokkurin gongur inn fyri fríari atgongd til skúlar, alment heilsuverk, sosialar skipanir, almennari eldrarøkt og einum minstamarki fyri livistøði hjá einstaklingum í Føroyum. Góðar almennar skipanir skulu jú tryggja frælsi hjá tí einstaka, so hon kann mennast og trívast best møguligt.

**Ríkisfelagsskapurin og ríkisveitingin**
Hyggja vit so at Ríkisfelagsskapinum og Ríkisveitingini í hesum ljósinum, er lætt at síggja, hví Sambandsflokkurin hevur eina positiva áskoðan á Ríkisfelagsskapin og Ríkisveitingina.

Ríkisfelagsskapurin er dømi um ein felagsskap, ið hevur tænt sum fyrimynd fyri aðrar skipanir. Skipanin er als ikki fullkomin, men hon hevur roynst sera væl í mong ár. Tað hevur verið møguligt støðugt at tillagað felagsskapin til broyttar umstøður. Týdningarmest er tó, at Ríkisfelagsskapurin og Ríkisveitingin hava tryggjað føroyingum persónligt frælsi. Tað telur mest.

ES-felagsskapurin hevur í stóran mun somu grundhugsjón, sum Ríkisfelagsskapurin hevur. Tað at útjavna livistøðini í ymisku landspørtunum í Ríkisfelagsskapinum er eins stór sjálvfylgja, sum tað er at útjavna livistøðini millum londini í Evropu. Tey prinsippini í sosialliberalismuni, sum eru galdandi inni í einum landi, eru eisini galdandi millum lond. Hetta er ein náttúrlig fylgja av, at sosialliberalisman er ein globalur hugsunarháttur.

**Sameina hugsjónirnar?**
Man kann seta sær spurningin, um tað ber til at sameina stríðið fyri persónliga frælsinum hjá tí einstaka við tankasettinum hjá tí Misskiltu Nationalismuni. Hartil er svarið nei!

Liberalisman sær, at staturin einans verður legitimeraður gjøgnum tað, at hann tryggjar fólki persónligt frælsi. Hvussu hann skipar seg, hevur minni týdning. Hvørjar uppgávur kommunurnar, landið, Fólkatingið ella Brússel taka sær av, er einans ein spurningur um innrætting. Tryggjar politiska skipanin ikki persónligt frælsi, er legitimiteturin hjá henni burtur.

Misskilta Nationalisman harafturímóti sær statin sum eitt mál í sær sjálvum. Politiska valdið er alfa og omega, meðan frælsið hjá tí einstaka hevur lítlan og ongan týdning. Einstaklingurin verður gjarna offraður í stríðnum hjá Misskiltu Nationalismuni.

Tí er ógjørligt at sameina hesi bæði sjónarmið í eina samanhangandi hugjón – tey eru so ymisk sum dagur og nátt.

Tíðargreinin